Sangfagnaður í Christiansskirkjuni

Um vikuskiftið verða ymisk tiltøk í KFUM og K í Klaksvík, sum enda við sangfagnaði í Christianskirkjuni leygarkvøldið, har eitt sankór við fleiri enn 200 luttakarum fer at syngja

Leygarkvøldið klokkan 19, fer eitt stórt sangkór, mannað við fleiri enn 200 sangarum at syngja í Christiankirkjuni. Hetta er helst størsta sangkór, ið nakrantíð hevur sungið har
Savnsmynd

MØTIR OG SANGUR
Rúna Sivertsen
runa@sosialurin.fo

Leygardagin verður songvenjingardagur í KFUM og K í Klaksvík. Um 200 fólk, bæði nýggir og gamlir sangarar, hava teknað seg.

Tað er Jóhanna Johannesen í Klaksvík, sum hevur tikið stig til stóru songvenjingina.

– Lovsongur hevur altíð havt stóran týdning fyri samkomuna, og hava vit tí gjørt av at royna at savna øll tey, ið syngja og hava sungið í kóri gjøgnum árini, sigur Jóhanna.

Við hjálp frá góðum kreftum eydnaðist at fáa upplýst nøvnini á teimum kórleiðarum, ið hava verið og nøvnini á teimum, ið hava sungið við í skiftandi kórunum hjá KFUM og K í Klaksvík.

Ætlanin er at samla øll í eitt stórt felagskór, har hvør kórleiðari leiðir ein sang frá tí tíðini, hann ella hon hevði sangkór. Eisini fólk, sum búgva uttanlands, hava teknað seg til songvenjingina.

Ein kona, sum er búsitandi í Keypmannahavn, ringdi til Jóhannu og segði, at hon ætlaði at taka ferðataskuna við til arbeiðis fríggjadagin, so hon kundi fara beinleiðis úr arbeiði á flogvøllin og heim.

Umframt songfagnaðin leygarkvøldið, verða eisini møtir hildin í KFUM og K. Møtini byrja fríggjakvøldið og halda fram til sunnudagin.

– Vit royna at skapa eina samkomu, har øll kenna seg væl. Slík vikuskifti eru bæði uppbyggjandi og savnandi. Vit gleða okkum at síggja so mong sum gjørligt til møtini, sigur Tummas Pauli Mýri, ein av ungu leiðarunum hjá KFUM og K í Klaksvík.

Hesir hava gjøgnum tíðirnar verið kórleiðarar í KFUM og K í Klaksvík:	
Elsebeth Reines Hals	1960-1961
Hans J. Glerfoss	1961-1962
Tórður Andreassen	1962-1963
Páll Sólbjørg	1963-1975
Eiler Samuelsen	1978-1985
Meinhard Bjartalíð	avloysti Eiler av og á
Óli Marner Christiansen	havt kór frá um 1990
Ólavur Johannessen	1982-1997
Eyðbjørn Jacobsen	1997 og frá 2002
Tummas Pauli Mýri	hevur havt kór frá 2002

Tobbi spyr um fiskiloyvi

– Tað gongur hevur gingið sum rótasúpan á feltinum og millum línumenn, at nýggi landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Bjørn Kalsø hevur útskrivað einum garna/línuskipi eitt sonevnt bankaloyvi, sigur Tórbjørn Jacobsen, løgingsmaður

FYRISPURNINGUR
Eirikur Lindenskov

– Kann landsstýrismaðurin vátta ella avsanna um nakað fiskiloyvi er útskrivað yvirhøvur síðani verandi samgonga varð skipað?

Hendan spurning vil Tórbjørn Jaocbsen, løgtingsmaður Tjóðveldisflokkin, hava Bjørn Kalsø, fiskimálaráðharra, at svara sær á tingfundinum í dag, 14. apríl.

Tórbjørn Jacobsen sigur, at tað hevur gingið sum rótasúpan úti á feltinum og millum línumenn, at nýggi landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum hevur útskrivað einum garna/línuskipi eitt sonevnt bankaloyvi. T. v. siga loyvi til at veiða á Føroya banka umframt tey loyvi, sum skipið hevur frammanundan.

– Fyrispurningurin verður settur fyri at landsstýrismaðurin skal fáa møguleikan at avsanna uppáhaldið, um eingi er í hesum tosi, sigur Tórbjørn Jacobsen.

– Men váttar landsstýrismaðurin hinvegin, at hann hevur útflýggjað eitt loyvi, sum vælsaktans økir um fiskidagatalið og veiðitrýstið, í mun til avgerðina hjá løgtinginum eftir ólavsøku seinasta ár, so mega tingmenn fáa at vita, hvørjar orsøkirnar eru til at framihjárættindi nú knappliga skulu galda fyri einstøk skip og reiðarí, sigur Tjórbjørn Jacobsen.

Spurningarnir, sum tjóðveldistingmaðurin setir fiskimálaráðharranum eru soljóðandi:

1) Kann landsstýrismaðurin vátta ella avsanna um nakað fiskiloyvi er útskrivað yvirhøvur síðani verandi samgonga varð skipað?

2) Um so er at nakað loyvi er útskrivað, hvat slag av loyvi er talan tá um og í hvørjum bólki, sambært § 28 í lógini um vinnuligan fiskiskap, var hetta loyvi latið?

3) Um so er at nakað loyvi er útskrivað, hvørjar orsøkir lógu tá til grund fyri avgerðini um at útskriva viðkomandi skipi/-skipum loyvi?

4) Um so er at nakað loyvi er útskrivað, hvørjir persónar í Fiskimálaráðnum hava tá undirskrivað loyvi áðrenn tað varð útflýggjað viðkomandi móttakara?

5) Um so er at nakað loyvi er útskrivað, er samlaða fiskidagatalið og harvið veiðitrýstið tá økt í mun til viljan hjá Føroya Løgtingi?

ítróttur
Nr. 70 • hósdagur • 14. apríl 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

Meistarin á veg til Dubai

Saman við Hans Kristiani Simonsen fer Martin Poulsen í morgin til Dubai at luttaka í sera sterkari kapping, har oljusjeikur tekur stóran til

Saman við Hans Kristiani Simonsen fer Martin Poulsen í næstum til Dubai, har teir báðir skulu taka lut í sterkari kapping
Mynd: Faroechess.com

FØROYAMEISTARIN Í TALVI
Jóannes Hansen

27. januar fylti hann 20 ár. Men hann hevur longu vunnið FM tvær ferðir. Tað er Martin Poulsen úr Havnar Telvingarfelag, sum vit tosa um. Hann liggur ikki á løtu síðuni, nú hann hevur vunnið FM í talvi. Í morgin fer hann av landinum. Saman við honum er talvvinmaðurin Hans Kristian Simonsen úr Kollafirði. Teir báðir eru á veg til Dubai, har teir skulu luttaka í altjóða kapping. Talan er um rættuliga sterka kapping. So sterka sum teir báðir ongantíð áður hava luttikið í.

– Eg kenni ein telvara úr Usbekistan, sum eitur Sergei Kayoumov. Vit luttóku saman í kapping í Ungarn nakað herfyri. Pápi hansara er stórmeistari, og mamman er talvvenjari. Hesin Sergei hevur syrgt fyri, at Hans Kristian og eg sleppa upp í part í sterku kappingini í Dubai. Um tað bara vóru styrkistølini, ið gjørdu av, hvør skuldi luttaka, so høvdu vit ikki sloppið við. Men vit hava fingið ágóðan av góða sambandinum hjá mær, sigur Martin Poulsen.

Bitin av talvi

Martin var ellivu ára gamalur, tá ið hann lærdi mannagongdina. Stutt eftir fór hann at ganga í Havnar Telvingarfelag, og síðani tá hevur hann ment seg skjótt og gjørt nógv við telvingina.

– Eg sleppi ikki undan at siga, at eg eri púra bitin av talvinum. Hesar síðstu mánaðirnar havi eg brúkt alla mína tíð til telving. Eg havi verið við í trimum kappingum í Ungarn, kapping í Onglandi og Wales, NM, kapping í Týsklandi og nú í FM kappingini.

Hvussu hongur hetta saman figgjarliga?

– Størsti og besti stuðulin hjá mær í telvingini er pápi mín, sum fór í Mexikanska flógvan í arbeiðsørindum, meðan vit telvaðu FM á Toftum. Um hann ikki hevði víst so stóran áhuga og stuðlað mær so væl, so hevði hetta ikki borið til. Eg gekk við posti, áðrenn eg gjørdi av eitt skifti at nýta alla tíðina til telving. Postfelagið hevur stuðlað mær nakað. At hava góð sambond ber við sær, at tað ikki altíð kostar so ógvuliga nógv. Í Dubai skulu vit rinda 35 dollarar um dagin fyri at búgva á góðum gistingarhúsi, og ferðin er ikki so dýr. Men tú gerst avgjørt ikki ríkur av at telva, sigur Martin Poulsen og so leggur hann afturat:

– Teir bestu fáa nógv burturúr í Dubai. Eg veit ikki, hvussu stórar virðislønirnar eru, men eg havi frætt, at oljusjeikurin, sum er vertur, hevur tikið rívan til.

Hvat rokna tit við at fáa burturúr í Dubai?

– Hans Kristian og eg báðir hava lægstu styrkistølini, so tað verður torført. Men vit hava gott mót. Tað er stórur fyrimunur, at vit eru tveir. Harvið kunnu vit stuðla hvørjum øðrum í fyrireikingunum. Tað hava vit roynt eina ferð áður. Í 2002 luttóku vit í kapping í Spania. Tað royndist so væl, sum tað ikki hevur gjørt fyri ella síðani. Ta ferðina høvdu vit ikki nóg nógvar heilt góðar mótstøðumenn. Tað vóru fýra IMarar í kappingini. Um ein hevði verið afturat, so hevði eg fingið ein IM.

Venjingin

Dyggastu talvvenjingina fær Martin Poulsen frammanfyri telduna. Hann hevur eitt talvprogramm, sum sigst vera tað besta, sum er til. Martin situr fleiri tímar hvønn einasta dag frammanfyri telduna.

Tá ið vit spyrja, hvør hevur verið besti venjarin hjá honum, so sigur Martin, at hann var ikki farin at telva, tá ið stórmeistararnir Predrag Nikolic og Ivan Sokolov fyrrapartin av níti árunum vóru fleiri ferðir í Føroyum.

– Fyri stuttum var eg í Keypmannahavn og vandi hjá Arthur Youssupov. Hann er ættaður úr Russlandi og býr nú í Týsklandi. Hann sigst vera ein tann besti talvvenjarin í heiminum. Eg var bara saman við honum nakrar fáar dagar. Eg haldi, at fatanin fyri spælinum viðkaðist ikki so lítið av at vera saman við honum. Men tað er sjálvandi avmarkað, hvussu nógv fæst burturúr, tá ið talan er um so stutta tíð.

Martin Poulsen hevur áður verið unglingameistari. Fyrsta ferðin, at hann luttók í landsliðsbólkinum, var í 2001. Tá endaði hann á tíggjunda og aftasta plássinum. Síðani endaði hann á fimta plássinum, og nú hevur hann vunnið FM tvær tær seinastu ferðirnar. Næstu tvær vikurnar fæst at síggja, hvussu tað fer at hilnast hjá Hans Kristiani Simonsen og honum í sterkari kapping í Dubai.

Høng Gymnasium og HF
Á Høng Gymnasium hendur tað eisini naka, tá ið klokkan hevður ringt út

Gymnasium og HF – skeið við kostdeild.
Ring ella hygg á heimasíðu okkara.
www.hoeng-gymhf.dk
tlf.:+45 5885 2636